Lýsing frá Bilasøluni:

# Niðurgerandi og óetisk

**Ein lýsing eftir starvsfólkið frá Bilasøluni hevur vakt miklan ans. Jón Kraagesten á Ferðslutrygd og forkvinnan í Javnstøðunevndini, Annika Wardum Joensen, meta lýsingina vera óetiska og niðurgerandi**

LÝSING
*Heini í Skorini*



*Annika Wardum Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini, heldur lýsingina hjá Bilasøluni verða niðurgerandi og gjørda í tankaloysi*

Í farnu viku varð lýsing prentað í Dimmalætting og Vikublaðnum, har Bilasølan við Øssi Johannesen sóknaðist eftir nýggjum arbeiðsfólki. Við greiðum seksuellum undirtónum verður í lýsingini spurt, "um tú ert til lakk ella leður?", har ein kvinna í leðurklæðum og hondjørnum er at síggja.

### - Skapar skaðiliga mentan

Jón Kragesteen á Ferðslutrygd sigur, at lýsingin ikki er hóskandi í slíkum høpi.

- Eftir mínum tykki skapar slík lýsing eina mentan, sum ikki er fremjandi í hesum umstøðum, tí bilurin verður gjørdur til annað enn tað, hann í veruleikanum er roknaður til. Jón Kragesteen vísir víðari á, at rættast hevði verið at lýst við tí, lýsingin veruliga snýr seg um, og leggur hann dent á, at talan er um eina óetiska lýsing.

- Vit mæla so avgjørt ikki til, at lýsingar við slíkum innihaldi verða nýttar á hesum øki, sigur Jón Kragesteen á Ferðslutrygd.

### - Niðurgerandi fyri menniskja

Forkvinnan í Javnstøðunevndini, Annika Wardum Joensen, er heldur ikki í iva um, hvat lýsingin elvir til.

- Eg reageraði negativt, tá eg fyrst sá lýsingina. Hon er niðurgerandi fyri eitt menniskja, serliga tí kvinnan á myndini er bundin, og tað eru fleiri, sum í veruleikanum hava upplivað slíkt. Annika Wardum Joensen leggur dent á, at tað er líkamikið, hvat kyn er á myndini. Hon hevði verið eins skaðilig, um talan var um ein mann.

- Trupulleikin er ikki, at ein kvinna er á myndini, men heldur at talan er um eitt bundið menniskja, og at avmynda ein persón á henda hátt hoyrir als ikki heima í slíkum høpi. Annika Wardum Joensen leggur dent á, at endamálið helst ikki hevur verið at niðurgera kvinnuna, men heldur at fáa fólk at varnast lýsingina.

- Í marknaðarføring er endamálið sjálvsagt at fáa fólk at leggja merki til lýsingina, og tí hevur ætlanin ikki verið at kynsdiskriminera, men eftir mínum tykki er lýsingin gjørd í tankaloysi.

Team 85 hevur gjørt lýsingina, sum Bilasølan við Øssi Johannesen hevur góðkent. Sosialurin royndi at fáa eina viðmerking frá Bilasøluni, men tíverri var hetta ikki gjørligt.



*Lýsingin í Dimmalætting og Vikublaðnum, sum Team 85 hevur gjørt, hevur elvt til ónøgd orsakað av seksuellu undirtónunum*

Yvirgangur í Suðurspania:

# Støkk gentur sluppu við skrekkinum

**18. juli endaði ein fimleikastevna í frítíðarbýnum Alicante í Suðurspania, har føroysku fimleikagenturnar úr Støkk luttóku. Leiðin gekk aftur til Føroya dagin eftir, og til alla lukku steðgaðu føroysku fimleikagenturnar ikki longri, tí longu tríggjar dagar seinni brast ein bumba bert eina gøtu frá bústaði teirra**

YVIRGANGUR
*Heini í Skorini*



*Genturnar úr Støkk vóru fá samdøgur frá at upplivað eina yvirgangsatsókn, tí tær vóru ikki meiri enn farnar úr spanska frítíðarbýnum Alicante, tá ein bumbað brast bert eina gøtu frá hotellinum, tær búðu á*

Nýggjar yvirgangsatsóknir frá baskiska felagsskapinum ETA hava seinastu dagarnar skelkað Spania. Týsdagin 22. juli brustu tvær bumbur í sponsku frítíðarbýunum Alicante og Benidorm við sponsku eysturstrondina, og í báðum førum brustu bumburnar á hotellum við strondina.

### Støkk gentur í sama øki

Sæð við føroyskum eygum er tað skelkandi, at genturnar úr Støkk í Eysturoynni júst eru afturkomnar úr hesum sama býi Alicante, og bumbaða hotellið var bert eina gøtu frá hotellinum, føroysku fimleikararnir búðu á. Lukkutíð vóru tær farnar, áðrenn yvirgangurin fór fram.

Talan var um bilbumbur, og við tað at ein maður frá ETA felagsskapinum hevði boðað løgregluni frá gjøgnum telefon áðrenn bumburnar brustu í teimum báðum býunum, fekk løgreglan evakuerað stórar partar av økjunum í Alicante og Benidorm. Hóast ávaringarnar vórðu átta fólk løstað eftir yvirgangin, men eingin læt lív.

### ETA økir um virksemið sítt

ETA hevur seinastu tíðina verið ein alsamt meiri virkin felagsskapur í stríði sínum fyri einum sjálvstøðugum stati í Norðurspania og suðurvestliga økinum í Fraklandi. Fyri einum mánaði síðani brast ein bumba í norðurspanska býnum Getxo, og eisini tað ferðina játtaði ETA at hava skipað fyri atsóknini.

Hetta virksemi hevur sjálvsagt skaðiligar fylgjur fyri sponsku ferðavinnuna í Spania, serliga tá talan er um yvirgang í paradisiskum frítíðarøkjum við strendurnar í Suðurspania, sum er høvuðsinntøkan fyri ferðavinnuna í Spania, og júst hetta tykist eisini vera endamálið hjá ETA. Felagsskapurin ávaraði eisini í spanska dagblaðnum Gara um yvirgang í Alicarte, sum hevur 300.000 íbúgvar.

Hesaferð vóru ikki minni enn 16 føroyskar fimleikagentur umframt onnur í ferðalagnum bert fá samdøgur frá at uppliva eina yvirgangsatsókn, tá bumban brast bert eina gøtu frá hotellinum, Støkk ferðalagið helt til á.

**Fakta um ETA**

Mest virkni guerilla felagsskapur í Vestureuropa

841 fólk hava latið lív í yvirgangsatsóknum frá ETA síðani 1968

Nýta bumbur og hondvápn

Stríðast fyri einum sjálvstøðugum stati í Norðurspania og suðurvestliga partinum av Fraklandi



# Gamlar myndir í 20 ár

MYNDAFRAMSÝNING
*Marjun Dalsgaard*



*Aftur í ár, er møguleiki at sýggja gamlar myndir úr Havn á Ólavsøkuframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Tórshavnar Býarsavn hevur staðið fyri myndaframsýningini í Smiðjuni í Lítluvík hvørja Ólavsøku í 20 ár.*

Tað er eftirhondini ein tradition at leita sær niðan í Smiðjuna í Lítluvík, at síggja gamlar myndir úr Havn. 20 ár eru liðin, síðan Tórshavnar Býarsavn við Finni Johansen á odda, skipaði fyri fyrstu myndaframsýningini. Henda fyrsta framsýningin umfataði gamlar myndir úr Havn, men síðan hava framsýningarnar verið skipaðar í evni, og nógv evnið hava verið frammi. Til dømis hevur ein framsýning verið við myndum av Havnará, ein við kollektivari samferðslu og ein framsýning hevur verið við andlitsmyndum, har tær flestu av teimum vóru tiknar av Kristin í Geil og vóru sostatt meira enn 100 ára gamlar.

Í ár eru gamlar svimjimyndir á Ólavsøkuframsýningini hjá Tórshavnar Býarsavni. Elsta myndin er frá 1919, nógvar eru frá 30'unum, 40'unum og longur upp í tíðina. Tær nýggjastu myndirnar eru frá yngra opna svimjihylinum i Gundadali, hinar myndirnar eru av fólki, ið svimur í Hoydalsá, Sandá, á Eystaru Vág, Vestaru Vág og á Bursatanga, sigur Finnur Johansen.

52 svimjimyndir verða at síggja á framsýningini, sum letur upp í Smiðjuni í Lítluvík fríggjadagin tann 25. juli klokkan 14 og høvi er at síggja myndirnar til dagin eftir Ólavsøku.

Framsýningin í Smiðjuni í Lítluvík er vanliga nógv vitjað, og tað er serliga undir framsýningi at Býarsavnið fær nógva nýggja vitan um myndirnar, tí tey vitjandi kenna tey, sum eru avmyndaði.

Eisini í ár er høvi at síggja kend andlit. Millum annað er Poul Petersen, eisini nevndur Svimji Poul á onkrari mynd í sambandi við eitt svimjiskeið, sum varð hildið í gamla svimjihylinum í Gundadali. Hann varð nevndur Svimji Poul, av tí at hann skipaði svimjingina í Havn. Seinni stovnaði hann Ítróttarsamband Føroya.

Harumframt er ein mynd av tveimum ungum kvinnum, sum eru farnar útferð í Sandagerð við berbarum gramofonspælara – tær hugna sær við sigarettum og einari fløsku í sólini. Líkt er til, at damurnar í Havn eisini roykt og drukku í 30'unum.

Føroya Fornminnissavn eigur ein triðjing av myndunum, sum eru á myndaframsýningini í ár, men eisini privatar myndir teljast í millum.



*Myndaframsýningin er vanliga sera væl vitja. Finnur Johansen sigur, at hann altíð fær nógva nýggja vitan um myndirnar frá vitjandi, sum kenna tey, sum eru avmyndaði*

# Eldradagur í Vágum

Eldradagur verður leygardagin 9. august í Bygdarhúsunum í Miðvági. Tiltakið byrjar við morgunkaffi klokkan 9.00 og Frits Jacobsen, formaður í Vága pensjónistfelag, setur síðan stevnuna klokkan 10.00. Døgurði verður at fáa klokkan 12.00, Hotel Vagar stendur fyri matinum. Fyrilestrar verða í skúlanum, sum heldur til í Bygdarhúsunum, og borðreitt verður niðriundir í Bygdarhúsunum.

Eldradagurin hevur í nógv ár verið eitt afturvendandi tiltak og byrjaði tá ST viðtók, at øll eldri eiga at hittast ein dag um árið.

Tað er landsfelagið, sum fyriskipar eldradagin, men øll eldri eru vælkomin. Tað er ikki neyðugt at vera limur í nøkrum pensjónistafelag.

Stevnan heldur fram til klokkan 18.00 og luttakararnir hava høvi at hoyra landspolitikarar eins og lokalpolitikarar greiða frá sínum sjónarmiðum á eldraøkinum.

Til dømis koma bygdaráðsformenn í Vágunum og siga nøkur orð, umframt Jonhild Jørgensen, sum er formaður fyri felagskommununi, eins og Jørgen Niclassen, løgtingsmaður, tosar um eldrapolitik.

Marius Dam, lækni, greiðir frá sjúkum og fyribyrging móti sjúkum, sum eldri kunnu fáa, og kunning um hjálpartól, sosialmál, eldraíbúðir og sunna matgerð verður eisini. Síðan siga Tómar Tómasson, formaður í landsfelagnum og Símun Pauli Poulsen skrivari í landsfelagnum nøkur orð. Á skránnið er eisini 'møguliga lættur fimleikur'.

Tiltakið hevur vanliga góða undirtøku, millum 200 og 300 fólk plaga at luttaka, men fyrireikararnir vilja fegin hava fleiri, sigur formaðurin í landsfelagnum, Tómar Tomassen. Serliga vónar hann at tiltakið førir til, at pensjiónistafeløgini kring landið fáa fleiri limir. Landsfelagið hevur tilsamans 1.200 limir, av umleið 7.000 eldri í Føroyum. Frits Jacobsen, formaður í Vága pensjónistafelag hevur góðar vónir um luttøkuna, nú tunnilin er komin.

Luttøka skal fráboðast í seinasta lagi 26. juli. á telefon: 332053, 333133, 333660 ella 441396. Kostnaðurin er 250 krónur fyri hvønn luttakara. Goldið verður við inngongdina.

MD



*Aftur í ár hittast eldri frá øllum Føroyum, har tey millum annað hava høvi at hoyra sjónarmið hjá politikkarum og stilla teimum spurningar. Í ár verður dagurin hildin í Miðvági.*